Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.





*Millum 250 og 300 fólk vóru til móttøkuna hjá P/f Føroyaprent*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*F.v.: John Wiliam Joensen, Norðlýsið, Páll Danielsen, Føroyaprent, Jonhard Hammer, Sosialurin, Ingi Samuelsen, Dimmalætting, Jákup Alberg Eliasen, Føroyaprent, og Eyðun Húsgarð, Prentmiðstøðin. Allir hesir, uttan Ingi Samuelsen, hava útbúgving sum prentarar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*F.v: Oliver Joensen, frá Norðlýsinum, Johannes A. Næs, fyrrverandi lærari og rithøvundur, og Pól á Kletti frá Dimmalætting*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Jón Hestoy, stjóri, og Hjalgrim Samuelsen, nevndarformaður í P/f Føroyaprent*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

P/f Føroyaprent, Tórshavn:

# Størsta fyritøka av sínum slagi í landinum

**Fríggjadagin 25. juni var móttøka hjá nýggju fyritøkuni P/f Føroyaprent við Hoyvíksvegin í Havn. Fyritøkan er ein samanlegging av prentsmiðjunum hjá Dimmalætting og Hestprent**

Harða kappingin á grafiska økinum - bæði í Føroyum og við útlendskar prentsmiðjur - hevur ført til at leiðslurnar á P/f Dimmalætting og Sp/f Hestprent hava lagt fyritøkurnar saman fyri at styrkja um kappingarførið.

Tann 23. juni 2004 stovnaðu teir nýggju prentsmiðjuna P/f Føroyaprent.

Í hesum nýggja felagnum fer alt virksemið hjá Hestprent og alt virksemið hjá Dimmalætting innan arkprent í nýggju smiðjuna, sum tó einki hevur við prenting av tíðindabløðum at gera.

Stjóri í P/f Føroyaprent er Jon Hestoy frá Hestprent, meðan Hjalgrim Samuelsen frá Dimmalætting er nevndarformaður. Stovnararnir eiga hvør síni 50 prosent í nýggja felagnum.

Prentsmiðjan hjá Dimmalætting var stovnað fyri 126 árum síðan og tann hjá Hestprent fyri 20 árum síðan.

Nýggja prentsmiðjan hevur eisini yvirtikið bygningin á Hoyvíksvegi 59 frá P/f Dimmalætting.

Umleið 30 starvsfólk starvast dagliga á nýggju prentsmiðjuni, sum nú er tann størsta landinum.

Á móttøkini hendan dagin vóru fleiri røður hildnar, nevndarformaðurin Hjalgrim Samuelsen greiddi frá um samanleggingina, og stjórin Jon Hestoy fortaldi um framtíðarætlanirnar. Síðani røddi Jan Müller, blaðstjóri á Sosialinum, ið millum annað greiddi frá sínum góðu royndum við samstarvinum við Dimmalætting um Prentmiðstøðina og samstarvinum við Hestprent, sum umsitur teknisku deildina á Sosialinum. Ingi Samuelsen, blaðstjóri á Dimmalætting helt ein talu fyri starvsfeløgum sínum, ið nú fóru at starvast í nýggja felagnum.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# 70 ára føðingardagar í Fuglafirði

Leygardagin fara eini hjún í Fuglafirði at halda 70 ára føðingardagar. Tað eru Jytta og Magnus Magnusson. Magnus fylti 70 hin 27. juni, og 17. september verður Jytta 70. Tey halda føðingardagarnar nú leygardagin 10. juli. Børnini eru heima, og tað verður opið hús hjá Ann, sum er yngsta dótturin hjá Jyttu.

Jytta og Magnus hava verið gift í 15 ár. Tey vóru bæði einkjufólk, tá ið tey giftust í 1989. Tey vóru í starvi hjá Skipafelagnum Føroyar, tá ið tey hittust. Hann sigldi við farmaskipunum, og hon arbeiddi í kantinuni á Handils & Frystivirkinum. Tá ið Skipafelagið hevði stóra føðingardagsveitslu á Kambsdali, lagaði tað seg soleiðis, at tey bæði hittust, gjørdust væl og giftust, og síðani hava tey verið eydnusom og hava havt eitt hugnaligt heim í Fuglafirði.

Jytta er úr Fuglafirði. Hon er triði yngst av teimum átta børnunum hjá Janu og Poul Nolsøe Olsen ella Leirvíks Póli, sum hann varð nevndur. Hon giftist við Poul Friang, sum var danskari, og sum í mong ár var bakari í Fuglafirði. Hann andaðist í 1986. Tey bæði eiga sjey børn: Teresa, sum býr í Århus, Jonna býr í Fuglafirði, Eileen býr í Hirtshals, Lillian býr í Runavík, Mille býr í Århus, og Maria og Ann búgva í Fuglafirði.

Jytta var heima hjá børnunum. Tá ið tey vóru undankomin, fór hon at út at arbeiða. Tað hevur ligið sera væl fyri hjá henni at gera mat. Eftir at hon gavst á Handils & Frystivirkinum hevur hon fyrireikað mat til føðingardagar og veitslur av øðrum slagi, og hon tekur framvegis á seg at levera smyrjibreyð. Nú Magnus er pensioneraður og ikki meiri siglir, hjálpir hann henni, og tað riggar væl.

Magnus er ættaður úr Haraldsundi. Foreldrini vóru Anna Katrina og Aðalstein Magnussen, sum var ættaður úr Íslandi. Tey fingu fýra børn, og Magnus var næstelstur. Magnus giftist við Honnu Klein úr Klaksvík. Hon var dóttur til Herdis og Hans Paula Klein. Hon doyði í 1984.



Hanna og Magnus eiga tvey børn. Anna býr í Haraldsundi, og Marius býr í Klaksvík.

Magnus lærdi til elektrikara og arbeiddi í nógv ár sum elektrikari í Klaksvík. Seinni fór hann at sigla sum maskinmaður við skipunum hjá Skipafelagnum, og tað gjørdist lívsstarvið hjá honum.

Nú Magnus er givin at sigla, er hann ofta í egningarskúrðunum í Fuglafirði, og so hjálpir hann konuni í hennara virki. Børn og svigerbørn og barnabørn hyggja ofta inn á gólvið, og blíðskapurin er óførur. Magnus er innløgumaður. Umframt fisk og egning dámar honum væl at fáast við mat og slakt. Tað kemur eisini yngra ættarliðnum til góða.

Teimum báðum verður ynskt hjartaliga tillukku, nú tey hava rundar føðingardagar, og vónandi fáa tey saman við familjuni og øllum hinum gestunum eitt gott føðingardagshald í Fuglafirði leygardagin 10. juli.

### Gullbrúdleyp

Í dag, 7. juli, hava Nancy og Thorolf Bjørklund gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima við hús frá kl. 15.00.

### Dagurin

**7. juli. Villebaldus**, deyður í 787. Saman við pápa sínum Rikardi og bróðurinum Vunibaldus gjørdi hesin enski munkurin pílagrímsferð til Róm og var tann einasti, ið kom fram. Seinni gjørdist hann biskupur í Eichstadt í Bayern.

# 154 færri persónbilar seldir

**Sølan av nýggjum bilum minkar framvegis. Serliga er sølan av persónbilum og vøruvognum nógv minkað, meðan sølan av nýggjum hýruvognum er vaksin. Nú verða eisini nakrir kampingvognar seldir**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í nýggjasta tíðindaskrivinum, sum Bileftirlitinum hevur sent út, sæst, at sølan av nýggjum persónbilum er minkað við næstan 22 prosentum í mun til í fjør.

Sama tíðarskeið í fjør vórðu seldir 704 persónbilar í mun til 550 í ár.

Sølan av vøruvognum er minkað við meira enn 30 prosentum.

Vert er at leggja til merkis, at nú verða nakrir kampingvognar seldir. Áðrenn høgu avgjøldini vóru tikin av, vórðu als eingir kampingvognar seldir.

**Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri JAN-JUN í 2004 og 2003.**

| Akfaraslag | Jun 2004 | Jun 2003 | Broyting Jun 04/03 | Jan-Jun 2004 | Jan-Jun 2003 | broyting 2004/2003 | %broyting 2004/2003 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 2 | 0 | 2 | 3 | 1 | 2 | 200,00% |
| Bussar | 0 | 0 | 0 | 1 | 3 | -2 | -66,67% |
| Kampingvognur | 2 | 1 | 1 | 3 | 1 | 2 | 200,00% |
| Hýrubilar | 2 | 1 | 1 | 20 | 9 | 11 | 122,22% |
| Lastbilar | 3 | 8 | -5 | 10 | 9 | 1 | 11,11% |
| Leguvognar | 0 | 1 | -1 | 0 | 5 | -5 | -100,00% |
| Motorsúkkla | 2 | 3 | -1 | 8 | 8 | 0 | 0,00% |
| Neyðsendakfar | 0 | 1 | -1 | 1 | 2 | -1 | -50,00% |
| Persónbilar | 104 | 161 | -57 | 550 | 704 | -154 | -21,88% |
| Smábussar | 1 | 2 | -1 | 3 | 5 | -2 | -40,00% |
| Tangabilar | 0 | 1 | -1 | 0 | 4 | -4 | -100,00% |
| Viðfestivognar | 17 | 18 | -1 | 61 | 53 | 8 | 15,09% |
| Vøruvognar | 19 | 24 | -5 | 98 | 143 | -45 | -31,47% |
| Samlað | 152 | 221 | -69 | 758 | 947 | -189 | -19,96% |

Í juni 2004 eru skrásett 27 nýggj prutl, og higartil í ár eru skrásett 102 nýggj prutl.

